## Kanna heilsuskipan

Í mars koma tveir granskarar av handilsskúlanum á universitetinum í Aarhus til Føroyar at kanna, hvussu tað hevur riggað at seta talgildu heilsuskipanina, THS, í verk í Føroyum. Hetta er ein skipan, har allir upplýsingarnir um sjúklingin verða goymdir talgild og tað ger tað lættari hjá heilsufólki ymsastaðni at fáa útvega sær neyðugar upplýsingarnar.

Tað skrivar Aarhus universitet á heimasíðu síni. Talgildar heilsuskipanir eru vanligar, men tað, sum ger skipanina í Føroyum serstaka, er, at hon umfatar bæði sjúkrahúsini og kommunulæknarnar. Tað merkir at kommunulæknin og sjúkrahúslæknarnir altíð hava somu talgildu sjúklingabók til taks og tað hevur nógvir fyrimunir tí so hava allir partar í skipanini altíð nýggjastu upplýsingarnar um sjúklingin beint við hondina. Tað, sum donsku granskararnir koma til Føroyar at kanna, er, hvussu skipanin í Føroyum riggar, og um tað gevur skjótari og betri viðgerðir.



## Lærir nólsoyarkonur um pengar

Í annaðkvøld verður fundur fyri kvinnur úti í Nólsoy har Søren L. Bruhn, stjóri í Suðuroyar Sparikassa, fer at greiða frá um figgjarviðurskifti.

Tað eru tær báðar nólsoyarkvinnurnar, Guðrun Sundar Hansen og Katrina í Geil, sum skipa fyri. Tær eru annars báðar tilflytarar.

- Endamálið er at skipa fyri nøkrum tiltøkum fyri kvinnur í Nólsoy. Hetta er so fyrsta tiltakið, men vit ætla sjálvandi eisini at skipa fyri onkrum lættari tiltaki á kvinnudegnum 8. mars, sigur Guðrun S. Hansen.

Orsøkin til, at tað júst gjørdist Søren L. Bruhn og figgjarviðurskifti er, at hann sigst at duga sera væl at greiða frá, og at konufólk – sambært Guðrun S. Hansen – ofta ikki gea sær so nógv far um figgjarviðurskifti.

- Hetta hevur einki við reyðsokkarørsluna at gera, og Valkyrjurnar í Suðuroy eru íblásturin. Vit vilja bara sjóða kvinnurnar í Nólsoy saman við hugnaligum tiltøkum, og tað er galdandi fyri kvinnur í øllum aldri, bæði til gaman og álvara, sigur Guðrun Sundar Hansen.

Hetta fyrsta tiltakið, sum altso verður við Søren L. Bruhn, verður í Petersens Pakkhúsi í annaðkvøld, hóskvøldið, klokkan 19.30. Eftir fyrilesturin verður kjak við kaffi og køkum..

## Fleiri og fleiri skiljast

Hjúnarskilnaðir hava verið støðugir síðstu árini, men í 2010 valdu nógv fleiri hjún at fara hvør til sítt

Umhvørvisstovan umsitur lógina um fólkayvirlit, har øll persónsrelatera staðfesting verður framd. Dømir um staðfestingar eru føðingar, andlát, flytingar, ættleiðing, hjúnarskilnaðir og sundurlesing v.m. Umhvørvisstovan hevur hagtalsyvirlit av skrásetingunum yvir tíð.

Síðani 2006 hava hjúnaskilnaðir verið støðugir, men sum tað sæst niðanfyri, er talan um eina munandi økjing í 2010.

Samanteljing:
2006: 74
2007: 76
2008: 73
2009: 74
2010: 106



*Reiðaríið hjá Váðasteini er dømt at gjalda 51.000 krónur í bót fyri oljudálking. Uppruddingina hevur reiðaríið goldið fyri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bót fyri at oljudálka

**OLJUDÁLKING Reiðaríið hjá Váðasteini skal gjalda 51.000 krónur í bót fyri oljudálkingina á Havnarvág í fjør**

Randi Jacobsen

Umhvørvisstovan gav reiðarínum hjá línubátinum Váðasteini 51.000 krónur í sektaruppskoti fyri, at olja fleyt yvir av skipinum ein sunnudag í fjør. Reiðaríið vildi ikki gjalda bótina, og málið fór tí í rættin.

Dómurin í rættinum var tann sami sum sektaruppskotið, og reiðaríið skal harafturat gjalda sakarmálsútreiðslurnar.

Tað serliga við hesum máli var, at automatiska pumpuskipanin varð sett til at pumpa olju úr goysmlutanganum yvir í nýtslutangan, og tá ið skipið hevði lagt at, fór maskinmeistarin í land.

Váðasteinur lá mannleysur, meðan oljupumpingin fór fram.

Út á dagin varnaðust fólk, at olja fleyt úr skipinum, og sór alt í gongd.

Tað kom fram í rættinum, at reiðaríið ongar forskriftir hevði fyri oljupumping, og Umhvørvisstovan skuldsetti reiðaríi fyri ósketni við at líta blint á automatisku pumpuskipanina, sum í hesum førinum ikki riggaði.



*Óli Breckmanner farin aftur í gamla starvið sum studentaskúlalærari í Hoydølum, sum hann hevur havt farloyvi frá síðani 1984. Fyribils hevur hann tí farloyvi frá starvinum sum tingmaður*

# Óli ivast í tinginum

**ASDASD – Eg royni at røkja mítt starv sum lærari í Hoydølum, sigur Óli Breckann, sum ikki hevur verið í tinginum síðani 1. desember í fjør**

Eirikur Lindenskov

Síðani 1. desember í fjør hevur Óli Breckmann havt farloyvi frá løgtingsarbeiðinum. Hann varð ikki afturvaldur á valinum seinast, men eftir at Fólkaflokkurin aftur kom í samgongu í september í 2008, fekk hann fast sæti sum triði varamaður á tingi.

Tá Anfinn Kallsberg gjørdi av at leggja frá sær í politikki, gjørdist Bjarni Djurholm fastur tinglimur. Óli Breckmann er tó framvegis varalimur, men er í farloyvi úr Tinginum.

Hóast Fólkaflokkurin misti ein fastan politikarar, tá Jørgen Niclasen fór úr landsstýrinum, so hevur Óli Breckmann framvegis fast sæti, tí Anfinn Kallsberg hevur lagt frá sær. Óli Breckmann hevur sitið á tingið síðani 1974, og hevur hann sitið longri enn nakar annar, sum nú er á tingi.

- Eg havi altíð hildið sum so, at varalimirnir skulu sleppa at royna seg á tingi, og eg havi jú mítt borgarliga starv í Hoydølum at taka mær av, segði Óli Breckmann við Portalin herfyri.

Meðan Óli Breckmann er í farloyvi sum varamaður á tingi, er tað Rodmundur Nielsen, sum er varamaður fyri hann. Óli Breckmann visti ikki reiðiliga um ella nær hann tekur við aftur løgtingssessinum.



*Eg eri samdur við Oddfríð Marna Rasmussen í tí, at tað er rætt, at tað almenna letur starvslønir til listafólk, millum annað eisini rithøvundar, og eri sostatt ósamdur við Gerhard Lognerg, tá hann mótmælir hesum...*

*Sigvald Kristiansen*